# Handilstreytir

### 1. Brúk av persónsupplýsingum

Vit brúka persónsupplýsingar, tú gevur okkum, til at bíleggja vøruna og koyra hana út til tín. Privatar upplýsingar verða ikki givnar víðari, undantak er tó, um hetta er í sambandi við levering av vøru.

### 2. Prísir

Prísurin, vit geva tær fyri eina ávísa vøru, er tann endaligi prísurin. Tú fært vøruna heim til tín uttan at skula gjalda eyka oman á hendan prísin ella at skulla roksast við at tolla vøruna sjálv/-ur.

### 3. Skráseting hjá Megi

ÍVF Megin
Tjarnarlág 33
100 Tórshavn
V-tal: 674494
Teldupostur: megi@megi.fo

### 4. Reklamatión – skaði ella feilur á vøruni

Er feilur við vøruni, verður tú biðin um at senda okkum ein teldupost á megi@megi.fo, har tú greiðir frá, hvør feilurin er, og hví tú vilt nýta reklamatiónsrættin.

Tú verður biðin um at gera vart við møguligan feil, so skjótt, tú ert blivin varug/-ur við hann.

Reklamatiónsrætturin er 24 mánaðir fyri privatkundar.

Um tú nýtir reklamatiónsrættin innan fyri 12 mánaðir, frá tú móttekur vøruna, verður vøran fyrst send á verkstað fyri at staðfesta feilin. Um feilurin verður staðfestur, og hann er fevndur av keypilógini viðv. mangul, verður vøran umvæld, og tú fært hana aftur.

Verður reklamatiónsrætturin brúktur millum 12 og 24 mánaðir, frá tú móttekur vøruna, verður vøran fyrst send á verkstað fyri at staðfesta feilin. Um feilurin verður staðfestur, og hann er fevndur av keypilógini viðv. mangul, fært tú peningin afturgoldnan ella eina nýggja vøru, sum er sama slag.

Virkir, ið keypa frá Megi, hava 12 mðr. reklamatiónsrætt.

**Viðvíkjandi seriunumrum**
Tá ið tú nýtir reklamatiónsrættin, er tað umráðandi at seriunummarið, ið fylgdi við vøruni, er til staðar og lesandi. Reklamatiónsrætturin fellir burtur, um seriunummarið er skatt, tikið burtur ella á annan hátt gjørt ólesiligt.

Tá ið tú nýtir reklamatiónsrættin, skal vøran sendast til:
ÍVF Megin
Vørubrekka 4
160 Argir
Føroyar

**Standur á vøruni, tá tú nýtir reklamatiónsrættin**
Tá ið tú sendir vøruna inn til reklamatión, minst til at pakka vøruna forsvarligt inn saman við øllum tilhoyrinum, ið fylgir við, sum t.d. káplar, brúksvegleiðing og líknandi.

Skaðar á vøruni grundaðir av skeivari handfaring av vøruni, umskapan, grovum misbrúki ella installering av triðjapartssforritum eru ikki dekkaðir av reklamatiónsrættinum.

Um klisturmerkir við seriunumrum ella innsigli (plombering) hava fingið skaða, eru oyðiløgd ella ikki til staðar, kann hetta ávirka reklamatiónsrættin.

**Kanningargjald ísv. reklamatión**
Tá ið tú sendir vøru inn til reklamatión, verður hon kannað á verkstaði fyri at staðfesta feilin. Um tú nýtir reklamatiónsrættin, og eingin feilur er við vøruni, kostar hendan kanningin. Prísurin á hesum er 250 kr. pr. hálvan tíma, íroknað MVG, tó er hægst møguliga upphæddin 500 kr. íroknað MVG. Tí er best at tryggja sær, at feilur er við vøruni, áðrenn sent verður inn.
Um feilur verður staðfestur, og hann er fevndur av keypilógini viðv. mangul, rindar tú einki.
Vøran verður sett í upprunaligu stillingina, tá hon verður kannað. Tí er tað umráðandi at kanna, at tað ikki eru triðjapartsforrit, persónligar stillingar ella drivarar, ið skapa feilin.

Minst til at gera eitt kopi/backup av øllum tínum dátum. ÍVF Megin tekur ikki ábyrgd av møguligum tapi av dátum.

Um skaðin blívur váttaður, rindar Megi fraktina. Um skaðin ikki verður váttaður, rindar keypari fraktina, sum er 350 kr..

## 5. Frakt

Vøran verður bíløgd eftir, at tú hevur goldið. Aftaná bílegging verður vøran vanliga leverað til tín innan fyri tvær vikur, um hon skal leverast í Tórshavn. Skal vøran leverast aðrastaðni í Føroyum, kann leveringstíðin vera longri. Vit bíleggja vøru hvørja viku, og vanliga kemur vøran vikuna eftir. Tó kunnu ávísar umstøður gera, at leveringstíðin verður longri.

## 6. Útkoyring

Vit levera vørur kring allar Føroyar. Fyri keyp undir 2.000 kr. er prísurin fyri útkoyring 149 kr., um keypið er yvir 2.000 kr. er útkoyring ókeypis.